# Óli, sannleikin og kryvjimaskinan

DAN R. PETERSEN



Í grein í bløðunum 17.11.06 sigur Óli Jacobsen meg lúgva, tá eg fortelji, at eg fór inn í málið um kryvjimaskinuna, tá reiðari hevði kroyst manningarnar longur enn loyvt var, og teir onga hjálp høvdu fingið frá Óla.

Søgan er henda: Vit fingu kryvjimaskinu umborð januar - februar í fjør. Á, tann Harrans lætti.

Í apríl mánað fekk eitt trolarapar, vit høvdu tætt tilknýti til, somu útgerð. Nakað áðrenn hetta arbeiðið var liðugt, fortaldu hesar manningar okkum, at teir umvegis skiparan høvdu fingið at vita, at teir sjálvir skuldu gjalda hesa útreiðslu fyri reiðaran.

Vit lógu á Toftum, og eg ringdi beint til Óla og bað hann kvala hesa ætlan í føðingini, tí hetta var greitt álitis- sáttmálabrot, sum fór at skapa fordømi fyri aðrar reiðarar.

24. apríl koma manningarnar til skipini, sum nú hava nevndu maskinur installeraðar. Áðrenn mynstrað verður, kemur reiðarin umborð við einum pappíri, har hann krevur, at fólkið skal gjalda maskinurnar við einum hálvum parti frá hvørjari manning t.v.s. hálvum øðrum parti,annars fekk tað fylgjur.

Umboð fyri manningarnar ringja til F. F. at klaga. Boðini frá Óla vóru: “Tit skulu ikki skriva undir!” og so var samrøðan liðug. Var Óli nakar maður tá, so troppaði hann sjálvur upp á kajini og legði skipini við brestin, inntil mynstrað varð eftir galdandi sáttmála. Manningarnar vóru tá so sperdar, at tær skrivaðu undir. Mundi Erlendur Patursson, sum fór í geglið fyri sínar limir, havt handlað so jonkasliga?

Hetta var 24 apríl, og skipini geva hálvan annan túr og koma inn við maskinskaða 8. mei. Tástani frætti eg, hvussu kroystar manningarnar høvdu verið.

Nú sá eg onga meining í at ringja aftur til Óla, men ringdi til næstformannin, sum eg havi samstarvað væl við í 30 ár.

Eg spurdi hann, hvat nevndin í F. F. segði til, at reiðari hevði kroyst sínar menn til sáttmálabrot.

Svarið var, at nevnda mál hevði ikki verið fyri á fundi, og sjálvur hevði hann bara hoyrt hesi tíðindir í einum føðingardegi. Tá hugsaði eg: **drívur Óli F. F. sum sína egnu kiosk, tá hann ikki orienterar nevndina um slíkt álvarsmál?**

Einar fimm minuttir eftir samrøðuna við næstformannin, ringir Óli og spyr, hvat eg vil. Eg fortelji honum søguna og sigi annars, at nú fari eg í bløðini við málinum.

Tann 11. mei skrivar Óli bræv til Reiðarafelagið (endurgivið 17.11.06), har hann í sera mjúkum vendingum átalar at ávísir reiðarar meir ella minni trýsta fiskimenn at skriva undir...

Tann 13. mei skrivar Edvard í Skorini Joensen eftir áheitan frá mær grein um málið í Sosialinum.

Tá var skipara og Navigatørfelagið eisini komið uppí.

Var Óli farin inn í málið, tá eg gav honum tað fyrsta preiðið, høvdu 3 manningar sloppið undan at verið eyðmýktar av sínum reiðara, og Óli hevði borið seg at sum ein rættur fakfelagsmaður. Tað gjørdi hann ikki.

Nei, Harra formaður! Dan R. Petersen lýgur ikki. Hann hevur sera gott minni, og so noterar hann sær dato.

Hesa søguna kenna nógvir sjómenn og rista við høvdinum yvir sín formann. Tað er millum mangt annað slíkar hendingar, sum hava gjørt, at eg ætli at loysa hann av 31. januar 2007.

# Kanska ein framgongd?

HENRIK OLD
løgtingsmaður



Í sambandi við tíðindasendingina í SvF í gjárkvøldið kom fram, at tað var ein sjálvfylgja at allur Javnaðarflokkurin atkvøður fyri grein 266b í revsilógini. Eg vil bara minna á, at hetta mál tvær ferðir fyrr hevur verið til atkvøðugreiðslu í tinginum. Fyrru ferð í mai 1988 við sama orðaljóði.

Tá hevði Javnaðarflokkurin átta tingmenn, har allir atkvøddu ímóti. Teir vóru: Poul Jacob Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Henrik Old, Jørgen Thomsen, Jóannes Dalgsgaard, Jákup Lindenskov, Sverre Midjord og Tummas Arabo.

Tá málið var til viðgerðar í fjør vóru teir fýra av sjey, sum atkvøddu »ja«. Í sjónvarpsins eygum er tað væl ein stór framgongd.

# Sermentanin í tinginum

DAGNY JOENSEN



Í danska sjónvarpinum var aftur sjón fyri søgn, hvussu limirnir í tinginum skapa sær sína egnu mentan, sum teir barnsliga uppáhalda, uttan mun til hvat rørir seg millum borgarar í hesum landi.

Í kjakinum um samkynt og teirra rættindi ella tørv á rættindi, hevur verið sagt og gjørt almikið, uttan tó at veruliga málið hevur flutt limirnir eitt vet í parlamentarisku viðgerðini.

Í tingvarpinum hevur verið møguligt at fylt við orðaskiftinum í tinginum um at veita samkyntum innivist grein 266B í revsilógini, og tað var ikki hugaligt at síggja landsins kosnu grundgeva fyri sínum sjónarmiðum, og í álvara ikki himpraðust at skjóta seg undir bæði Gud og hin grábeinta.

Av teimum, sum býttisliga hjálptu sær við Bibliuni, snúði tað seg ikki um at skapa rættvísi fyri ein minnilutabólk – ja, í veruleikanum er hugsandi, at tinglimirnir, sum mótmæla uppskotinum, eru fullkomiliga líkasælir um støðuna hjá teimum samkyntu.

Tað snýr seg ivaleyst meira um spæl fyri gallarínum, fyri at tekkjast veljarum. Ikki vist at allir veljarar hjá mótstøðufólkunum góðtaka teirra fjákalótir, og vónandi verður tað ikki gloymt, tá tað aftur stundar móti vali.

Tað vanlukkuliga í øllum hesum er, at tingið er avdúkað – bæði herheima og í útlandinum, sum eitt avoldað ódemokratiskt parlament, har tey mest víðgongdu sleppa at koma til orðanna, uttan at fáa veruligt mótspæl frá øðrum tingfólkum, sum kanska ikki tíma at øna teimum aftur.

Eg ivist ikki í, at flest tingfólk eru hampakvinnur og –menn, sum taka sítt arbeiði í størsta álvara, men hvat er til at taka, tá orðaskifti í tinginum verður drigið niður á so lágt støði, at tað kanska er skomm at svara aftur?

Eitt er vist: vit byggja einki land við slíkum afturhaldskreftum, sum bert hava í huga at ”frelsa” neyðars borgarar í hesum landi – og tað frá landsins hægsta røðarapalli. Mín áheitan til Jenis, Gerhard og Bill, bara fyri at nevna nakrar – farið í tykkkara bønarhús við persónligu kristnu sannføring tykkara og latið onnur, sum virða sítt tingarbeiði, smíða landsins lógir.

So kann hvalvíksprestur halda sínar prædikur í kirkjuni, og ikki sum í danska sjónvarpinum, rósa sær av, at í Føroyum kann hann kalla samkynd pædofil og samstundis viðganga, at tað kann hann ikki í Danmark, tí har er ”sexuel orientering” innlimað í grein 266B, og tá hevði hann framt lógarbrot. Er tað ikki nóg greitt fyri tingfólkunum og føroyingum annars, at júst hetta er kjarnin í málinum?

Hvussu við lógarsmíðinum í framtíðar føroyska samfelagnum, tá eitt so pinkulítið mál kann fylla so nógv í Føroyum, at tað frættist

# Ódnarveður um vikuskiftið

**Petur Skeel, veðurfrøðingur, væntar ikki eitt blítt vikuskifti um oyggjarnar**

VEÐRIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Leygardagin verður vindur av útnyrðingi, og hann veksur vindin út á kvøldið. Tað verður turt. Sunnunáttina og sunnudagin kemur eitt djúpt lágtrýst við hvarvi inn yvir oyggjarnar.

- Talan er um líka djúpt látrýst sum í ódnini í 1988, sigur Petur.

Hetta gevur storm av landsynningi og í støðum upp í hvassan storm.

Hann minkar vindin eitt vet sunnudagin. Veðrið heldur fram mánadagin við nógvum vindi.

Hitin leygardagin verður 3 - 6 stig. Sunnudagin verður eitt sindur lýggjari - upp til 8 stig. Mánadagin verður aftur kaldari.



# Undirsjóvartunnil og flogvøll

ÓLI MIKKELSEN
lækni

Undirsjóvartunnil millum Hvítanes og Eysturoy eigur at verða gjørdur skjótast tilber. Metingar vísa at hetta vegastrekki fer at hava nógv mestu ferðslu í Føroyum. Talið av bilum verður so stórt, at verkætlanin kann fíggjast við rímiliga lágum tunnilsgjaldi.

Hesin tunnil opnar fyri ótali av nýggjum møguleikum, ikki bara í Runavík men víða um.

**Dundrandi skeiv vegaføring**

Eg taki mítt uppskot fram aftur, har tunnilin gongur millum Hvítanes og Ritvíksháls og verður stívar 7 km langur.

Út fyri Hvítanesi er dýpið minst og verður farið tann vegin, verður hallið í tunlinum so lítið, sum til ber, við teimum fyrimunum, tað gevur.

Tunnilsmunnarnir vera í óbygdum øki við møguleikum fyri íbindingum í fleiri ættir. Eystari tunnilsmunnin liggur væl fyri til íbinding í nýggjan veg omanfyri húsini í Runavík. – Hesin vegur má fáa høgan prioritet fyri at lætta um vaksandi ferðslutrupulleikar í Runavík.

Tunnilin kann gerast stytri, um farið verður móti Æðuvík, men spurningur er, um tað loysir seg.

**Flogvøllur**

Í 1963 varð kanning gjørd at finna best egnaða plássið til alternativan flogvøll. Skorhæddin var mett at vera besta plássið og grundgevingar vóru

1. Møguleikar fyri instrumentflúgving
2. Økið er mitt í Føroyum
3. Møguleikar eru fyri tvørbreytum




Á Skorhæddini er rættuliga javnur vindur – tí hevur SEV sett vindmyllur upp har.

Alternativur flogvøllur á Skorhæddini liggur væl fyri viðvíkjandi mjørka. Tá tjúkt er vestanfyri, er næstan altíð klárt á Skorhæddini. Í góðum summarveðri kann mjørki leggjast á Skorhæddina á eysturætt; men tá er klárt vesturi í Vágum. Var flogbreyt á Skorhæddum, høvdu trupulleikarnir, vit hava havt av mjørka um ólavsøkutíð í ár, verið at kalla burtur.

Flogbreyt í landnyrðing/útsynning kann vera ca 2000 m. Lendið har er at kalla slætt, so henda breyt kann ikki vera so kostnaðarmikil at gera – og verður arbeiðið samskipað við tunnilsgerð, verður tað uppaftur bíligari.

Henda breyt hóskar best til høvuðsættina í Føroyum, sum er útsynningur.

Við teimum arbeiðstólum, tøk eru í dag, átti ikki at verið so ovurhond dýrt at fingið 4000 m. flogbreyt eftir røðini á Eystnesi.

**Ófatuligt**

At gera framkomnar vindmátingar í Søltuvík og á Glyvursnesi, uttan at taka Skorhæddina við, kennist ófatuligt. Á vesturætt kann mjørki vera í Vágum, men samstundis eisini í Søltuvík og á Glyvursnesi, og hvussu er við tvørbreyt í Søltuvík og á Glyvursnesi?

Krav má vera, at arbeitt verður fyri at finna bestu alternativu flogbreyt, og at vegakervið verður so trygt og gott, sum tilber.